

*Her er eitt dømi, har helvtin av felguni er reinsað við Shiny Wheels við sera góðum úrsliti*

· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

Sp/f Plátuverkstaðið
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo



**CITROËN BERLINGO 1,6 ÁRG. AUG. 2003**
Bilurin er skrásettur sum vørubilur. Hann hevur tóna›ar rútar og er n‡liga botnvi›gjørdur. Baksetrini, n‡ggj summardekk, útvarpstól/bandspælari og n‡montera›ur sleipikrókur fylgja vi›. Prísuppskot kr. 110.000,-. Gevi› eitt bo›. Km. einans 16.500.

**Tel. 210621**

Sp/f INCRA:

# Nýtt føroyskt produkt til reingerð av felgum

**Hjá teimum sum hava almikið stríð av at halda alu-felgurnar á bilinum reinar, er gott nýtt at frætta. Eitt nýtt føroyskt produkt er komið á marknaðin, sum loysir hendan trupulleika**

**REINGERÐ**

Sp/f INCRA v. Regin W. Dalsgaard í Havn er komin á marknaðin við einum nýggjum føroyskum produkti til reingerð av felgum.

Regin W. Dalsgaard sigur, at hann fekk hugskotið í samband við at hann hevur havt so trupult við at halda felgurnar á sínum egna bili reinar. Hann setti sær tí fyri at gera eitt produkt at reinsa felgurnar við, sum var lætt og ómakasleyst at arbeiða við.

Produktið eitur Shiny Wheels - spray on wash of, og skal tað bert sproytast á felgurnar og skolast av aftur aftan á 3 minuttir.

Nógv er gjørt burtur úr at spraydunkarnir skulu síggja atraktivir út og vera lættir at handfara.

Framleiðslan verður gjørd saman við Kemilux, og í Føroyum verður tann lidna vøran seld gjøgnum Poul Michelsen.

Shiny Wheel kemur væntandi á marknaðin í næstu viku, og prísurin verður avgjørt kappingarførur. Produktið er royndarkoyrt við góðum úrsliti á bilasøluni Autoservice, sigur Regin, sum væntar, at teir koma at brúka hesa vøruna framyvir.

Annars er Shiny Wheel serliga ætlað til útlendska marknaðin, í fyrsta umfari Danmark og Ísland.

# C30 verður ein minni Volvo

**Um umleið eitt ár verður vøruskráin hjá Volvo víðkað við einum nýggjum modelli, C30, ið verður minni enn núverandi S40. Talan verður um ein hatchback við trimum hurðum**

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Volvo skulu hava eina størri og meira umfatandi vøruskrá. Um umleið eitt ár er ætlanin at koma á marknaðin við einum bili, sum er minni enn núverandi Volvo S40.

Talan verður um C30, ið er ein hatchback við 3-hurðum, bygdur yvir sama plattform sum S40 og V50. Møguliga verður aksilfrástøðan styttri.

C30 skal kappast við bilar sum t.d. VW Golf, Audi A3 og BMW 1-seriuna. Bilurin kemur á marknaðin síðst í 2006 ella fyrst í 2007. Annars eru ikki nógvir upplýsingar komnir um bilin enn.



*Volvo C30 verður ein hatchback við trimum hurðum. Bilurin líkist øllum hinum Volvo-modellunum framman*